## Sjúkrahúsverkið 2007:



Sosialurin fer nú undir eina greinarrøð í trimum pørtum, har Jákup Petersen, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, hevur eina bersøgna gjøgnumgongd av støðuni í føroyska sjúkrahúsverkinum.

Í blaðnum í dag umrøðir hann støðuna ímillum tey trý sjúkrahúsini og hann nemir við, hvussu leiðslubygnaðurin á Landssjúkrahúsinum er ein forðing fyri at menna sjúkrahúsverkið.

Í øðrum parti vísir hann á, at játtanin til sjúkrahúsverkið er økt einar 100 milliónir, uttan at nakað er fingið burturúr av týdningi. Og í triðja parti vísir hann á, at ein broytt játtanarskipan kundi ført til kapping, so at brúkarin fær betri tænastu fyri lægri prís

# Søpla 100-140 millióni[r] burtur um árið



*Leiðslubygnaðurin á Landssjúkrahúsinum er ein leivd av fakfelagsstríði. Tílíkt hevur ført við sær, at leiðslan á Landssjúkrahúsinum í stóran mun ikki hevur tikið sær nóg mikið av málum, sum hon fyrst og fremst eigur at taka sær av. Við eini tílíkari leiðsluskipan er framburður útihýstur, sigur Jákup Petersen*

**Ineffektiv leiðsla og ineffektiv játtanarskipan føra við sær, at føroyska sjúkrahúsverkið søplar einar 100-140 milliónir krónur burtur um árið, sigur Jákup Petersen, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum í eini bersøgnari gjøgnumgongd av sjúkrahúsverkinum**

*Jákup Petersen, yvirlækni*

### 1. partur

Tað føroyska sjúkrahúsverkið er í støðugum politiskum andgletti. Skipanin sum vit hava, førir ikki til framburð, men heldur til, at vit grava skotgravir. Ein nevnd fyri og onnur eftir gongur og melur í teimum somu gravunum uttan at fáa lyft hvørki skipan, leiðslu ella kanning og viðgerð uppá eitt framkomið støði.

Seinastu rembingarnar eru, at viðgerðin innan føroyska sjúkrahúsverkið skal savnast á Landssjúkrahúsinum fyri síðani at verða flutt av landinum.

Ineffektiv játtanarskipan og leiðsla gera, at vit árliga søpla burtur umleið 100 - 140 milliónir krónur av landsins skattakrónum, bert roknað innan sjúkrahúsverkið.

Eitt spjatt heilsuverk, sum verður rikið av politikarum Sjúkrahúsverkið hevur av náttúrligum orsøkum munandi áhuga millum landsins borgarar. Tað snýr seg jú um grundleggjandi møguleika og rætt borgaranna, tá ið teir fáa skaða ella gerast sjúkir. Sostatt er tað nærliggjandi, at persónar, sum vilja profilera seg alment, hava sjúkrahúsverkið sum eitt av føstu hornasteinunum í teirra framløgu.

Tað hevur tó altíð undrað meg hvussu tað ber til, at kommunulæknar, sum hava størsta árinið á fólkaheilsuni í Føroyum, so at siga ikki verða tiknir uppá tungu. Verða teir nevndir, snýr tað seg oftast um, at tað mangla kommunulæknar, at tað eru alt ov nógvir vikarar o.t., men tað verður lítið talað um serlæknar, høgan kvalitet, neyva stýring av játtan, effektivan arbeiðshátt, gjøgnumskygni, demokratiskt eftirlit o.s.fr. á hesum økinum.

**Ætlanir eru frammi um, at savna kanning og viðgerð á Landssjúkrahúsinum fyri síðani at flyta alt av landinum**

Í Dimmalætting 9 februar eru at síggja myndir av tveimum djúpt hugsandi monnum. Annar er sjúkrahússtjórin á Landssjúkrahúsinum, Tummas í Garði og hin er landsstýrismaðurin í Almanna- og Heilsumálaráðnum, Hans Pauli Strøm.

Saman við tíðindamanni Dimmalættingar, Janusi Haraldsen, verður høvdið aftur lagt í blot um, hvussu vit skulu leggja til rættis tilgongdina innan sjúkrahúsverkið.

Enn einaferð verður gingið á gomlu gøtunum. Neyðugt er at miðsavna verður sagt. Og Tummas í Garði leggur afturat, at "Tað er heilt upplagt, at vit fara at miðsavna viðgerðartilboðini í føroyska sjúkrahúsverkinum. Eg vil siga, at tað er ein hóttan at spjaða tey út á fleiri sjúkrahús. Tað er at brenna óneyðugar resursir av". So er tað sagt!

Nú veit eg ikki hvør tað er, sum Tummas í Garði kallar fyri "vit". Hann er læknastjóri á Landssjúkrahúsinum og hevur so vítt eg veit ikki ábyrgd av sjúkrahúsverkinum sum so. Hinvegin er so mikið trupult við gjøgnumskygni, at eg kann fara skeivur.

Tá læknastjórin er liðugur at siga hetta, leggur hann afturat, at vit framyvir fara at kanna sjúklingar í Føroyum fyri síðani, at senda teir avstað til viðgerðar uttanlands, og bert viðgerða triviellar (smávegis) sjúkur í Føroyum.

Hann er sostatt talsmaður fyri, at miðsavna føroyska sjúkrahúsverkið til Landssjúkrahúsið fyri síðani at flyta viðgerðina víðari til Keypmannahavn og Reykjavík ella líknandi støð. Her var vist okkurt sum ikki ruggaði rætt. Fyrst skal viðgerðin samlast á Landssjúkrahúsinum fyri síðani at flytast av landinum. Halló – er tað nakar sum fylgir við!

**Landsstýrismaðurin vil hava kvalitet í veiðgerðini og at peningur ikki fer fyri skeyti**

Landsstýrismaðurin er royndur politikari og viðgerð málið útfrá, at vit skulu hava kvalitet í viðgerðini og at peningur ikki skal fara fyri skeyti ímeðan arbeitt verður. Virðismiklir grundarsteinar at hava, men ikki beinleiðis nakað nýtt. Harafturat leggur hann dent á, at vit mugu gera eina ætlan fyri hvat og hvar vit viðgera í Føroyum og hvørjar sergreinar/serlæknar vit skulu hava. Hetta taki eg sjálvandi fult og heilt undir við og vóni, at um vit skulu halda á við tí skipan vit hava í dag, at tað verður skjótt arbeitt á hesum øki.

**Føroyska sjúkrahúsverkið verður ferð eftir ferð viðgjørt politiskt og endar hvørja ferð við einum politiskum vilja um at hava 3 sjúkrahús í Føroyum. Hetta verður av leiðandi persónum mett sum ein forðing heldur enn ein møguleiki.**

Tað Føroyska sjúkrahúsverkið arbeiðir innan karmin á Løgtingslóg nr. 89 frá 4. juni 1996 við seinri broytingum (seinast broytt fyri tveimum árum síðani).

Her verður í almennu reglunum í kapitul 1, millum annað sligið fast, at verkið fevnir um tey 3 sjúkrahúsini, Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar Sjúkrahús, Suðuroyar Sjúkrahús og tilhoyrandi stovnar. At øll sjúkrahúsini hava rætt til at seta á stovn sergreinir og at tað skal verða minst eitt mediskinskt og eitt kirurgiskt yvirlæknastarv.

Tað sum hevur eyðkent ymisk arbeiði, rapportir, tilmæli o.s.fr., tá tað kemur til sjúkrahúsverkið, er, at omanfyri nevndi karmur hevur verið mettir sum ein forðing í arbeiðnum, og ikki ein møguleiki ella rættur til at menna verkið. Hetta hevur serliga gingið út yvir tey smærru sjúkrahúsini, sum ikki hava verið tikin heilt í álvara og annars eru sloppin at siglt sín egna sjógv.

Tílíkt hevur so ført við sær ónøgd frá sjúkrahúsum og politikarum og enda við væntandi samarbeiði, óneyðugum illgrunum, ineffektiviteti og sostatt hevur ov lítið verið fingið úr givnum játtanum.

Tað er av stórum týdningi, at tað framyvir verða gjørdar ætlanir har øll 3 sjúkrahúsini verða tikin í álvara so at tey kenna seg trygg og soleiðis óttaleys kunnu ganga inn í eitt fruktagott samarbeiði.

**Stundin er komin til at menna okkara sjúkrahús og geva teimum meiningsfullar uppgávur í einum framkomnum samfelag.**

Helst er tað so, at hvørt land sær má gera eina niðurstøðu um, hvussu sjúkrahúsverkið skal síggja út. Í Føroyum hava vit 3 smá sjúkrahús, og tann dag vit halda nakað annað, er vandi fyri, at menning og játtan fara av lagi. Tað er onki sum talar ímóti, at vit kunnu fáa eina nøktandi dygd á øllum 3 sjúkrahúsunum við, at gera ein góðan struktur og eitt gott samarbeiði innan verkið.

Gjørd er ein ørgrynna av kanningum viðvíkjandi kvalitetinum og búskapinum hjá smáum og stórum sjúkrahúsum, og nakar stórvegis munur hevur ikki verið at funnið.

Eitt ávíst samband hevur verið at sæð í kvaliteti samanborið við talið av sjúklingum fyri hvønn lækna